

www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 03 - 2012

# 6000 umsóknir til 320 summarstørv í Statoil

Í Noreg eru verkfrøðingar mangulvøra, men í Statoil kunnu tey meiri ella minni velja og vraka millum hesar. Um sumrarnar hevur fyritøkan nevniliga eina rúgvu av verkfrøðilesandi knýtt at sær  í fjør var talið 292, og í ár er hetta hækkað til 320 størv. Nýggjastu tølini vísa, at væl omanfyri 6000 fólk sendu umsókn til tey 320 summarfrítíðarstørvini hjá Statoil. Hjá Aker Solutions siga tey somuleiðis, at stórur eftirspurningur er eftir summarfrítíðarstørvum har. Tey lýstu eftir 25 verkfrøðilesandi í ár, men ikki færri enn 600 umsóknir komu. Vit miða eftir at seta eins nógv fólk í starv sum í fjør, tað vil siga omanfyri 25 fólk. Nú verður arbeitt við verkætlanarleiðarum okkara fyri at gera greitt, hvussu stórur okkara tørvur er, sigur samskiftisráðgevin hjá Aker Solutions, Cathrine Gjertsen, við dn.no. Tone Rognstad, sum hevur ábyrgdina av arbeiðsorkuni í Statoil, sigur við Stavanger Aftenblad, at tey 320 summarfrítíðarstørvini er ein liður í útvega so nógva arbeiðsorku sum gjørligt. Tone Rognstad sigur somuleiðis, at møguliga verður okkurt av hesum summarfrítíðarstørvunum bjóðað onkrum sum fast starv seinni.